# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

varð byrjað beint eftir kríggið, uppat.

Men hóast hesa stóru sølu av skipum, stóð virkið ikki eftir við ongum. Beint eftir kríggið komu fleiri 30-tons bátar til bygdina, og onkrar av hesum átti Niclasen upprunaliga, meðan teir uppkeyptu aðrar so við og við. Av hesum bátunum kunnu nevnast »Akranes«, »Broddur« og »Royndin«.

Hetta var so mikið trygt rávørugrundarlag, at Niclasen í 1954 settu á stovn eitt flakavirkið. Hetta var fyrsta flakavirkið í landinum. Dánjal var stjóri, men virkisleiðarin fyrstu fýra árini var Brynjálvur Mortensen, langabbasonur gamla Jóhan Mortensen, sum stovnaði Mortensenshandilin á Tvøroyri. So á ein hátt rann saman aftur.

Flakavirkið arbeiddi mest hýsu, ið varð skorin til flak, pakkað í pundspakkar, fryst og seld av landinum. Toskurin varð tá eins og nú, allur saltaður. Tað gav besta prísin. Sama mynstur av fiskaframleiðslu, sum vit í Føroyum enn hava.

Sildin var eisini ein stórur partur av virkseminum, har sildin var umsaltað í tunnur á landi. Hetta helt fram til sildin hvarv.



*Norðstovuhandilin, sum hann upprunaliga sá út*

## Flogfar varð keypt

Øll hesi árini var eisini handlað við tí sum upprunaliga var byrjað við, nevniliga matvøru, byggitilfari og øðrum vanligum brúksvørum. Men hetta nøktaði ikki virkisfýsni hjá táverandi stjóra felagsins, Dánjal Niclasen, sum eisini á øðrum økjum gjørdi um seg.

Millum átøk hansara kann nevnast stovnanin av Føroya Fiskasølu í 1948, sum tá gav eina munandi hækking av útflutningsvirðinum. Dánjal var eisini eitt skifti stjóri á Føroya Fiskasølu.

Tó var kanska mest umrødda royndin at seta á stovn fyrsta flogsambandi millum Føroyar og Keypmannhavn. Føroya Flogfelag var stovnað í 1946.

Til hesa roynd var flogfarið »Erla Kongsdóttir« keypt. Men royndin skuldi tó ikki vísa seg at gerast serliga væl eydnað. Tað skuldi nevniliga ikki eydnast flogfarinum at gera ein einasta túr millum londini.

Flogfarið var eitt kombinerað vatn- og landflogfar. Stutt eftir at flogfarið var komið til landið, vóru teir farnir oman á Sørvágsvatn at vaska farið. Niðan aftur komnir, skuldi teir seta flogfarið tvørtfyri á breytini. Úrslitið var, at flogfarið fór útav breytini og oman móti vatninum.

Flogfarið fór rættuliga illa, og avgjørt var tí at senda tað niður til Danmarkar til umvælingar. Men fyri at gera ilt verri, so misti farmaskipið flogfarið fyri borð, og burtur var tað.

Nú vísti hetta seg ikki at fáa ta stóru ávirkanina á ætlanina, tí eftir bert trimum túrum við einum leigaðum Catalina flogfari, fekk SAS gjøgnum danskar mynduleikar steðga flúgvingini. Ikki var møguligt at fáa neyðugu loyvini. Tað gingu eisini rættiliga nógv ár, áðrenn føroyingar fingu loyvi frá donsku myndugleikunum at flúgva.



*Fyrsta ferðafólk, sum steig úr flogfarinum í Føroyum, tá Scottish Aviation royndi rutuflúgving millum Føroyar og fastlandið. Dánjal Niclasen tekur ímóti.*

## 70-ini vóru trupul

Í 1971 varð Dánjal'sa lívneisti at enda komin, og var tað Niclas Niclasen, ið tá tók við starvinum sum stjóri í fyritøkuni.

60-ini og 70-ini vóru sera trupul í fiskivinnuni, og tað merktist eisini fíggjarliga í fyritøkuni. Niclas, sum var leiðari á øllum Sjóvinnubankadeildunum í Vágum, valdi at fara at leiða fyritøkuna, hóast hon fleyt tung í sjónum og virksemið var minkandi.

Niclas hevði stórt hugflog og góðan vilja. Sildin var horvin undir Føroyum, so hann leigaði føroysk skip at sigla til Skotlands at keypa sild, sum bleiv pakkað umaftur í Føroyum.

Hann royndi eisini at seta livandi hummara út á Sørvágsfirði, hummara hann fekk úr Kirkwall. Hóast royndin ikki eydnaðist sum ætlað, er enn hummari á fjørðinum.

Í sjeytiárinum vantaði rávøra til virkið, og var tí 1977 aftur ein roynd gjørd við størri skipi. Tá var »Vesturleiki« bygdur. Hann var eitt av teimum 9 polskt bygdu línuskipunum, ið tá komu til landið.

Heilt fram til 1979 rak Niclasen flakavirki. Í eini bjargingarætlan valdi Niclas at fara burtur úr fiskivinnuni og halda seg til upprunaliga virksemi, nevniliga handil.

Eftir tað kom landskassin inn við studningi til fiskivinnuna. Øll tann føroyska fiskivinnan var í svárum trupulleikum.

Tá keypti kommunan virkið, og trý ár seinni varð tað selt privatum. Samstundis varð eisini »Vesturleiki« seldur til Jósup Henriksen og aðrar í Sørvági, ið umbygdu hann til trol.

Matvøruhandilin var eisini sleptur seinast í 70-unum, tá Norðstovuhandilin var seldur. Handilsvirksemið var ikki mitt í bygdini meira, men helt til á bryggjuni, har timburhandil og byggikramhandilin hildu fram.

Virksemið var minkað og truplu tíðirnar høvdu sett síni spor. Tá kreppen fyrst í 90-árinum kom, var neyðugt at endurreisa fyritøkuna. Teir tríggir synirnir hjá Niclasi reistu peningin við einum triðingi til hvønn. Hesir tríggir hava búsett seg í hvør sínum heraðshorni í heiminum. Tann elsti, Edward Niclasen, er vinnulívsmaður í Grønlandi, næsti, Dánjal Niclasen, er rækjuskipari í Kanada, meðan tann yngsti, Jørgen Niclasen, var einasti eftir í Sørvági, og hann var settur stjóri í fyritøkuni.

Teir tríggir stovnsettu eisini saltfiskavirkið Tomba. Umframt framleiðslu, landaði og pakkaði felagið eisini saltfisk frá nógv umrøddu Loynikrókabátunum. Framleiðslan helt fram til 1998, tá valt var at steðga og leggja feløgini saman.

Í 90-unum keypti felagið eina kaffistovu úti á Bakka í Sørvági og bygdi hana um til bensinstøð. Umframt brennievni, fæst eisini har góðgæti, grillvørur og matvørur. Á ein hátt aftur á slóðina.

Eins og byrjanin fyri 140 árum síðan, er tað handil, sum fyrtøkan fæst við í dag. Umframt besinstøð, hevur fyritøkan timburhandil á bryggjuni og eisini handil við byggivørum, amboðum, máling, búnýtum o.ø.

Líkt einum føðingardegi, er tað fýrverk, ið serliga verður selt 140 ára dagin.